Skráseting Føroya

25. februar 2025

**Kunning um møguleika hjá føroyskum feløgum at fáa útflýggjað danskt CVR-nummar og MitID Erhverv.**

Í samstarvi við danskar myndugleikar hevur Skráseting Føroya fingið í lag eina skipan, har føroysk feløg nú fáa møguleika at fáa útflýggjað eitt danskt CVR-nummar.

Við einum donskum CVR-nummari kunnu feløg fáa útflýggjað MitID Erhverv, ið gevur atgongd til at nýta tænastur hjá- og samskifta við danskar stovnar og myndugleikar, ið áður ikki hevur verið gjørligt fyri føroysk feløg.

Skipanin er sett í verk. Feløg, ið ynskja at fáa tillutað og útflýggjað eitt CVR-nummar, kunnu á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya heinta og fylla út oyðublaðið *"Oyðublað um CVR-nummar"* og senda hetta umvegis teldupost til skr@vs.fo.

Erhvervsstyrelsen sendir CVR-nummarið til Skráseting Føroya, ið útflýggjar CVR-nummarið til felagið.

Tá felagið hevur fingið útflýggjað eitt danskt CVR-nummar, kann felagið heita á donsku Digitaliseringsstyrelsen um at fáa útflýggjað MitID Erhverv. Digitaliseringsstyrelsen stendir fyri at útflýggja felagnum MitID Erhverv.

**Gevið gætur!** Við nýggju skipanini er tað ein treyt, at felagið kann vísa á ein danskan bústað. Tað er ein treyt at feløg, almennir myndugleikar og viðskiftafólk kunnu koma í samband við felagið á hesum bústaði. Bústaðurin verður harumframt knýttur at felagnum á heimasíðuni hjá CVR.

Tað er skyldan hjá felagnum at fáa í lag eina avtalu við eigarin ella leigarin av bústaðnum og at syrgja fyri at viðkomandi skilur skyldurnar, ið fylgja við bústaðarskrásetingini. Tað er somuleiðis skylda felagsins, at boða frá broytingum í eigara- ella leigaraviðurskiftum í bústaðnum.

**Skráseting Føroya**
Sigmundargøta 13
110 Tórshavn

Postboks 264

Tlf: +298 356010

Fax: +298 356015

Teldupost: skr@vs.fo

**Gevið gætur!** Við nýggju skipanini er tað ein treyt at felagið upplýsir V-tal og virkiskotu (branchekode). Eru broytingar í virkiskotuni, hevur felagið skyldu at boða Skráseting Føroya frá hesum.

Vinarliga
Skráseting Føroya